

# Páll Finnur Páll á Summar Festival

**Føroya mest forelskaði tónleikabólkur fer at spæla á Summar Festivalinum í august**

Páll Finnur Páll telist millum heitastu nøvnini millum ung í Føroyum. Bólkurin úr Havn er vorðin landskendur fyri sín lætta og melodiøsa popptónleik.

Argandi tekstirnir eru eisini eitt sereyðkenni hjá bólkinum, men hóastyrkingarnar hjá bólkinum kunnu verða bæði stingandi og argandi, syngja og spæla teir við einum frískum glimti í eyganum. Framførslurnar hjá Páll Finnur Páll eru framúr góðar, og teir duga sera væl at fáa fólkið við. Tað hava teir víst til stór tiltøk kring landið.

Stóru hittini hjá bólkinum eru sangirnir um Herbergið og Forelskaða Sjónleikaran, men teir hava fleiri aðrar frálíkar sangir, sum tey ungu kenna væl.

Páll Finnur Páll fer í august mánaði at spæla á Summar Festivalinum í Klaksvík. Bólkurin hevði eina framúr góða framførslu í fjør, og teir koma aftur á festivalin í ár at seta sín eyðkenda dám á tiltakið.

# Rokna við nógvum fólki í ár

Heimskendur tónleikur, tøkniligar útbyggingar og enn fleiri fólk. Summar Festivalurin hevur beina kós frameftir, og spenningurin til ársins festival eru sera stórar

Tað er minni enn eitt hálvt ár til fjórða Summar Festivalin. Tiltakið í Klaksvík hevur eftir fýra árum vaksið til størsta og eitt tað týdningarmesta tónleikatiltakið í landinum, og longu nú er spenningurin stórur til ársins festival.

- Vit kenna tað sum, at áhugin fyri Summar Festivalinum bara økist, og vit rokna við, at tað koma 10.000 fólk á festivalin í ár. Fyrstu ábendingarnar í forsøluni vísa, at tað verða sera nógv fólk á festivalinum í ár, sigur Steintór Rasmussen, sum er ein av fyrireikarunum.

- Fólk bíðaðu sera spent eftir, at vit skuldu avdúka okkara fyrsta bólk, og tá ið vit so gjørdu tað, vóru fólk næstan ovfarin. Scorpions telist millum stóru bólkarnar í rocksøguni, og at tað ber til at fáa ein slíkan bólk til Føroya vísir, hvussu langt Summar Festivalurin er komin eftir fáum árum, sigur hann.

## Summar Festivalurin á myspace

Summar Festivalurin hevur nú fingið sína egnu myspace-heimasíðu. Á síðuni ber til at síggja myndir, síggja videobrot og annars frætta tíðindi um festivalin, sum verður hildin í døgunum frá 3. til 5. august.




